# Heimasíða hjá HFS

## Spurningar og svar til kravfesting

## Dagfest: 23.07.2026

| Spurningur | Svar |
|---|---|
| **Sniðhandbók og samleiki**<br>Vit vilja fegin fáa sniðhandbókina útflýggjaða, so vit kunnu taka hædd fyri búmerki, litum, skrifttypum og verandi samleika í okkara uppskoti til snið og brúkarauppliving. | Er sent serskilt til teir veitarar, ið hava umbiðið hetta.<br><br>Aðrir veitarar, ið ynskja tilfarið, verða bidnir at venda sær beinleiðis til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. |
| **Gjalda rokningar á heimasíðuni**<br>Viðvíkjandi møguleikanum at gjalda rokningar við gjaldskorti á heimasíðuni vilja vit fegin fáa útdýpað, hvat tit hugsa um. Skal brúkarin t.d. kunna gjalda við rokningarnummari/kundanummari, skal loysnin integrerast við eina faktura- ella fíggjarskipan, ella er talan um eina einfaldari gjaldsloysn, har brúkarin sjálvur tøppar upphædd og frágreiðing inn?<br>Vit vilja eisini fegin vita, um tit longu hava avtalu við gjaldsveitara/innloysara, ella um hetta skal vera partur av okkara uppskoti. | Talan er um eina einfaldari gjaldsloysn, har brúkarin sjálvur tappar upphædd og frágreiðing. Nokk í forleingilsi av einum talgildum formulari.<br><br>Seinni er ynski um, at ávísir formularar ikki kunnu sendast inn, uttan so at tilskilað uppæd er goldin áðrenn.<br><br>Vit hava ikki avtalu við gjaldsveitara/innloysara.<br><br>Tit eru vælkomin at upplýsa prísin fyri hetta serstakt. |
| **Síðuvísingar tvørtur um síður**<br>Í kravfestingini stendur, at innihald skal kunna vísast tvørtur um ymsu síðurnar, t.d. tíðindi á undirsíðum. Skulu vit skilja hetta sum, at innihald skal kunna endurnýtast fleiri staðni á heimasíðuni, t.d. tíðindi, greinar, skjøl, leinki ella formularar?<br>Skal hetta stýrast manuelt av ritstjóra, ella skal innihaldið vísast sjálvvirkandi út frá kategori, evni, tag ella annað? | Ja, hetta skal skiljast sum at tilfar skal kunna endurnýtast fleiri staðni á heimasíðuni, t.d. tíðindi, greinar, skjøl, leinki ella formularar.<br><br>Har tað gevur meining, t.d. kanska serliga innan tíðindi, skal innihaldið helst vísast so sjálvvirkandi (og feilsikkurt sum gjørligt), kanska: kategori, evni, ella tag eru ein fín loysn.<br>Tað skal vera lætt at stýra og tørvurin verður helst ymiskur, alt eftir hvør endaligi uppbygnaðurin verður. |

| | |
|---|---|
| **Hýsing, Landsnet og ábyrgdarbýti**<br>Viðvíkjandi kravinum um, at hýsingin skal vera í Føroyum og umsitin/stýrd av Landsneti, vilja vit fegin fáa greitt, hvussu ábyrgdarbýtið skal skiljast.<br>Ger Heilsufrøðiliga starvsstovan sjálv neyðugar avtalur um infrakervi, hýsingarumhvørvi, trygd, DMZ/millumservara og rakstur, ella ynskja tit, at tilboðsveitari skal lýsa og útgreina hýsingarloysnina nærri sum part av tilboðnum?<br>Vit vilja eisini fegin vita, um møguligur kostnaður fyri hýsing/infrakervi skal takast við í tilboðnum, ella um hetta verður handfarið beinleiðis millum tykkum og Landsnet. | Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur avtalu við Landsnet um servarar o.tíl., antin beinleiðis ella umvegis teirra undirveitarar.<br>Møguligir kostnaðir fyri hýsing og infrakervi, sum liggur hjá Landsnet verður handfarið millum Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Landsnet.<br><br>Men tað liggur arbeiði í at fáa uppsett samband og loysnir, ið gera at heimasíðan kann taka ímóti dátum frá journalskipan og aliskipan. Og at fáa hýsingina á Landsneti í lag.<br><br>Her vænta vit, at tað er partur av tilboðnum at veitarin tekur sær av samskifti og uppsetan í samband við hetta. |